Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Rósa Samuelsen, tingmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Skerjingar á Sernámi

Spurningar:

1. Hvørja heimild hevur Sernám til sjálvt at minka um virksemið innan dagstovnaøkið?
2. Er landsstýrismaðurin kunnaður um og/ella hevur góðtikið ætlaðu tillagingarnar í virkseminum frá nú og til juni 2023?
3. Veit landsstýrismaðurin at siga, hvør orsøkin er til, at starvsfólkatrotið er so stórt á Sernámi?
4. Hvussu stóra játtan hevur Sernám fingið til at reka sítt virksemi, tíðarskeiðið 2019-2022 og hvussu stóra játtan er ætlanin at veita stovninum í 2023?
5. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin í sambandi við at tryggja neyðugu fortreytirnar hjá Sernámi at reka virksemi á tann hátt, tað er tilætlað?

Viðmerkingar:

Barnarættindasáttmálin staðfestir m.a., at hóskandi lóggávulig og fyrisitingarlig tiltøk skulu setast í verk fyri at tryggja børnum ta vernd og umsorgan, sum er neyðug fyri barnsins trivna. Børnini skulu harumframt verjast í samsvari við tey aðalkrøv, sum myndugleikar hava ásett, við atliti at trygd, heilsu, starvsfólkatali og starvsfólkaførleika, umframt serkønari umsjón.

Á heimasíðuni hjá Sernámi stendur, at Sernám er tann stovnur, sum veitir ráðgeving innan sernámsfrøðilig viðurskifti til m.a. dagstovnar. Í skrivi til dagstovnar og dagrøktir varð kunnað um, at vegna avmarkaða starvsfólkaorku á økinum, verður virksemið hjá Sernámi tillagað frá nú og fram til juni 2023. Avmarkingarnar við sær, at dagstovnar og dagrøktir ikki fara at fáa sernámsfrøðiliga ráðgeving í hesum tíðarskeiði, undantikið akutt. Tænasturnar hjá Sernámi verða nú avmarkaðar til talu- og málmenningarøkið og rørslu- og sansamenningarøkið.

Avmarkingarnar bera við sær vanlukkuligar lagnur fyri børnini, sum ikki verða loftað, meðan tíð er. Tað er alneyðugt at raðfesta rætt á økinum og tryggja neyðugu fortreytirnar hjá Sernámi at reka virksemi á tann hátt, tað er tilætlað. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 16. september 2022

Rósa Samuelsen